# Fíggjarmálaráðið

**Lógartænastan**

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 07.07.2020 |
| Mál nr.: | 20/00244 |
| Málsviðgjørt: | TM, BAB, MM |
| Eftirkannað: | Lógartænastan dagfestir |

**Uppskot til**

**Kunngerð um broyting í kunngerð um tilgerð og útgerð hjá akførum (Útgerðarkunngerðin)**
(Broytingar í ásetingum um ljósføring á lastbilum og lendisakførum)

**§ 1**

Í kunngerð nr. 61 frá 16. mai 2017 um tilgerð og útgerð hjá akførum (Útgerðarkunngerðin) verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** § 9, stk. 1, nr. 1 verður orðað soleiðis:
“1) Tvær hvítar ella gulligar nærljóslyktir, ið venda frameftir, E- ella e-merktar, við assymetriskum ljósi ella, sum eru DOT-merktar og, sum uttan at blinda, kunnu lýsa upp vegin í minsta lagi 30 metrar, og tvær, fýra ella seks hvítar ella gulligar fjarljóslyktir, ið venda frameftir, E- ella e-merktar, sum kunnu lýsa upp vegin í minsta lagi 100 metrar, og sum eru settar til eina eftirlitslampu við føraraplássið, og sum skulu vera íbundnar soleiðis, at í mesta lagi fýra fjarljóslyktir kunnu vera tendraðar samstundis.
Bilur, hvørs loyvda heildarvekt fer upp um 3.500 kg, kann hava tvær, fýra, seks ella átta fjarljóslyktir, ið venda frameftir, E- ella e-merktar, sum kunnu lýsa upp vegin í minsta lagi 100 metrar og sum eru settar til eina eftirlitslampu við føraraplássið.”

**2.** Í § 11, stk. 1, nr. 2 verður “Eina ella tvær” broytt til: “Eina ella fleiri”.

**3.** Í § 11, stk. 1, nr. 6 verður “eina ella tvær arbeiðslyktir” broytt til: “eina ella fleiri arbeiðslyktir”.

**4.** § 11, stk. 2 verður orðað soleiðis:
“Lastbilur, vognrað, smábussur og bussur kann hava tvær ella fleiri hvítar bakkilyktir og tvær ella fleiri reyðar steðgilyktir, ið venda aftureftir.”

**5.** § 11, stk. 3 verður orðað soleiðis:
“Lastbilur, vognrað, smábussur og bussur kann á hvørjari síðu framman, hava tvær gular leiðvísandi blunklyktir, á hvørjari síðu tvær gular leiðvísandi blunklyktir og á hvørjari síðu aftan, tvær ella fleiri gular leiðvísandi blunklyktir.”

**6.** Í § 33 verður sum nr. 7 sett:
"7) Tríggjar hvítar ella gulligar nærljóslyktir, ið venda frameftir, og sum uttan at blinda kunnu lýsa upp vegin í minsta lagi 30 metrar, og tríggjar fjarljóslyktir, ið venda frameftir, ið kunnu lýsa upp vegin í minsta lagi 100 metrar."

**§ 2**

Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Fíggjarmálaráðið, 7. juli 2020

**Jørgen Niclasen**
landsstýrismaður

/ Bjarni Askham Bjarnason